

*Tey fýra, Kala, Rúni, Guðrun og Andrea. Philip var hjá vinmanni, tá myndin varð tikin*
Mynd Jan Müller

at hann hevur verið til sangleikin "Mamma Mia", og at tað var ordiliga stuttligt at uppliva.

## Gott at royna okkurt nýtt

14 ára gamla Andrea er glað fyri árið hon hevur búð í London: - Tað hevur verið ordiliga gott at royna okkurt nýtt. Tað hevur verið stuttligt at vera her, og eg havi fingið nógvar góðar nýggjar vinir. Eg plagi eisini at vera í einari fitness-miðstøð her á leiðini. Eg gleði at koma aftur til Føroyar, men eg komi at leingast eitt sindur eftir London, greiðir Andrea frá. Andrea sigur seg vera væl stinnari í enskum nú. 13 ára gamla Guðrun heldur eisini, at tað hevur verið stuttligt at hava búð eitt ár í London. – Her í London er nógv nýtt, og so nógv uppí tað sama, sum heima í Føroyum. Her kann ein t.d. skoyta og spæla tennis, og fer ein í býin, so eru nógv fólk, og tað følist ikki sum at ganga í býnum í Føroyum, staðfestir Guðrun. Guðrun sigur seg kortini tíma væl at fara heimaftur til Føroya. Hon gleðir seg at koma heimaftur til vinkonurnar hjá sær heima í Føroyum, men hon staðfestir, at talan hevur verið um eitt megagott ár í London. Men nú kemur familjan Hansen so heimaftur á klettarnar, har børnini kunnu ganga frítt á gøtunum, um enn gøturnar eru væl færri í tali enn gøturnar í London.